Tilbúgvingarstovnur Føroya

# Deildarleiðari til MRCC Tórhsavn

Tilbúgvingarstovnur Føroya søkir eftir deildarleiðara til virkisøkið MRCC Tórshavn. Deildarleiðarin fær dagligu leiðsluábyrgdina av virkisøkinum, sum fevnir um neyð- og trygdarradiotænastu, leiting og bjarging á sjónum og sjótilbúgving í breiðari merking.

**Høvuðsuppgávur**
Leiða og samskipa arbeiðið á MRCC Tórshavn, herundir

- tryggja at leiti- og bjargingarátøk lúka fyrisett mát og betrast
- tryggja fullgóða neyð- og trygdarradiotænastu
- seta í verk menningartiltøk fyri starvsfólk og samstarvspartar í sjótilbúgvingini
- samstarva um tvørgangandi uppgávur á stovninum
- virka fyri og tryggja gott samstarv við MRCC-støðir í grannalondunum
- umboða stovnin í føroyskum sum útlendskum samstarvsfora
- skiftast við varaleiðaran um at røkja uppgávuna sum bakvakt
- tryggja fullgóða umsiting av ISO 9001-góðskustýrisskipanini

**Almenn førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava hægstu nautisku útbúgving og minst 5 ára siglingstíð sum yvirstýrimaður ella skipari við handilsskipi ella aðra hægri ástøðiliga útbúgving og royndir innan eitt nú frálandavinnu. Drúgvar royndir við heilsu-, trygdar- og umhvørvisarbeiði ella royndir við leiti- og bjargingararbeiði eru ein treyt fyri at kunna røkja starvið. Innlit í góðskustýrisskipanir eru somuleiðis ein treyt.

Umsøkjarar skulu hava viðkomandi leiðsluroyndir, góð evni at fyriskipa og samstarva umframt duga at arbeiða sjálvstøðugt. Neyðugt er at hava hollan telduførleika og málkunnleika til føroyskt, danskt og enskt.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 35. lønarflokki í lønartalvu millum Tænastumannafelag landsins og Fíggjarmálaráðið. Lønin pr. 1. okt. 2006 er tilsamans 34.859,86. Afturat lønini verður viðbót fyri bakvakt goldin eftir stig 3, sum er kr. 2.986,47 um mánaðin. Starvsheitið er deildarleiðari og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til stjóran á Tilbúgvingarstovninum. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin verður Tilbúgvingarstovnur Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig tilmæli skulu sendast Tilbúgvingarstovni Føroya, Anni á Hædd, stjóra, Tinghúsvegur 64, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 20. juni 2007. Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Anni á Hædd, stjóra, á telefon 356610.

---

**Tilbúgvingarstovnur Føroya** fevnir um virkisøkini sjóbjarging, neyð- og trygdarradiotænastur, brunaumsjón og tilbúgving í breiðari merking. Høvuðsuppgávurnar hjá stovninum eru at samskipa leiting og bjarging á sjónum, tilrættalegging og samskipan av tvørgangandi tilbúgvingaruppgávum í samfelagnum, umsita brunaumsjónar¬mál, luttøka í norðurlendskum, millumlanda og altjóða samstarvi umframt at vegleiða myndugleikar, stovnar og kommunur í tilbúgvingarligum spurningum. Heimasíður: www.mrcc.fo og www.brl.fo

---

TVØROYRAR KOMMUNA

BARNAGARÐURIN MÝRIFIPAN

# Leiðari til Barnagarðin Mýrifipan

Barnagarðurin Mýrifipan søkir eftir leiðara 40 t./v. at byrja 1. august. Okkara dugnaligi leiðari hevur sagt seg úr starvi vegna víðari útbúgving, tí sóknast vit eftir einum nýggjum leiðara.

Í barnagarðinum eru 67 børn býtt í 2 stovur og 1 vøggustovu. Harumframt eru 20 børn í útibarnagarði. Í barnagarðinum er eisini eitt stuðulstoymi, sum tekur sær av børnum við serligum tørvi.

Á dagstovnaøkinum í Tvøroyrar kommunu eru broytingar á veg, við tað at ein vil byggja eina integreraða institutión, har bæði dagrøktin (spælistovan) og barnagarðurin eru saman, kortini við hvør sínum leiðara. Somuleiðis er ætlanin at fáa avtalustýring í kommununi við barnagarðinum sum eitt pilotprojekt. Tann, ið verður settur, má tí vera nýhugsandi og megna at møta fjølbroyttum avbjóðingum.

**Vit bjóða**

- Eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi har náttúran hevur stóran týdning og leiklut í gerandisdegnum og har spælið fyllir nógv.
- Dugnalig starvsfólk.
- Eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði við nógvum avbjóðingum.
- Møguleika fyri sjálvstøðugari støðutakan innanfyri avtalaðar karmar.
- Møguleika fyri eftirútbúgving innan leiðslu o.a.

**Vit vænta at tú**

- Ert útbúvin námsfrøðingur, helst við leiðsluroyndum.
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir.
- Hevur hugsjónir um virksemi á einum stovni, ið rúmar bæði vøggustovu, barnagarð og útibarnagarð.
- Hevur hug og áræði at skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag í einum avbjóðandi fakumhvørvi, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum umframt foreldrum og starvsfelgum.
- Hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi.
- Sært møguleikar framum vansar.
- Hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir.
- Kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur.
- Dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanveggja.
- Hevur teldukunnleika á brúkarastøði.

**Setanaviðurskifti**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF.

**Meiri fæst at vita**
Um starvið við at venda sær til Susanne Madsen, leiðara á sosialu deild, á tlf. 371085 kl. 10.00 – 16.00

**Umsókn**
Saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving, skal sendast til:

**Tvøroyrar Kommuna, sosiala deild**
Tværávegur 27 · FO- 800 Tvøroyri
viðm. »Leiðari til Barnagarðin«

Freistin at søkja er fríggjadagin 15. juni.

---

FJARSKIFTISEFTIRLITIÐ
TELECOMMUNICATIONS AUTHORITY

# Bókhaldari

Fjarskiftiseftirlitið, ið er stovnur saman við Posteftirlitinum, skrivstovuni hjá Kappingarráðnum, Tryggingareftirlitinum og Skráseting Føroya sóknast eftir bókhaldara, at byrja skjótast til ber.

**Tín førleiki:**

- bókhaldsútbúgving ella líknandi
- dugir væl føroyskt og danskt, umframt kunnleika til enskt
- kunnleika til EDV á brúkarastigi
- kunnleika til fíggjarskipan landsins

**Tínar uppgávur:**

- bókhaldsarbeiði, stemma av, rokningar til skuldarar v.m.
- postavgreiðsla
- umsita tryggingarviðurskifti stovnsins
- telefonavgreiðsla
- ársuppgerðir og avrokning

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi og læruríkt starv, sum tú sjálv/ur ert við til at skapa, við skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikum.

**Løn- og setanartreytir:**
Starvið er tíðaravmarkað til 1 ár, men møguleiki er fyri, at starvstíðin kann leingjast. Starvi er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Post- og Fjarskiftiseftirlitið, Kappingarráðið, Tryggingareftirlitið og Skráseting Føroya.

**Umsóknir:**
Hevur starvið tín áhuga, ert tú vælkomin at senda umsókn við prógvum, viðmælum o.ø. til:

**Fjarskiftiseftirlitið**
Skálatrøð 20
Postboks 73
FO-110 Tórshavn

ella á t-post fse@fse.fo

innan mánadagin 11. juni 2007 klokkan 12:00

Upplýsingar um starvið fært tú frá Jógvan Thomsen, stjóra á 356020 ella á 216020.

***Fjarskiftiseftirlitið***

Meira fæst at vita um stovnarnar á: www.fse.fo, www.kapping.fo, www.tryggingareftirlit.gov.fo, www.posteftirlit.gov.fo og www.skraseting.fo

---

# Campingvognur til sølu

Hobby 650 Umfe árg. 2006 til sølu.

**Nærri fæst at vita á tel. 517316**

---

# Útleigan til fyritøkur

Møbelerað hús mitt í Havn verður útleigað til fyritøkur frá 1. august 2007.

**Ring á tlf. 0045 30 51 75 32**